# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# 67 bilar bíðaðu eftir Teistanum

**Skopun:** Eftir at hava hildið páskafrí á Sandoynni, vóru mong sum ynsktu at sleppa sær norður um aftur í gjár, 2. páskadag.

Hetta tók sína tíð, tí Teistin megnaði ikki at taka allar bilarnar hvønn túrin.

Ta einu løtuna stóðu ikki færri enn 67 bilar og bíðaðu eftir at sleppa á Gomlurætt.

Hetta hevur fingið sandoyingar at spyrja, hví Strandferðslan ikki setti Ternuna inn í siglingina, nú so nógvir bilar vóru at flyta.

- Var leiðin á privatum hondum, var longu eitt annað skip sett inn í sigling. Teistin klárar als ikki allar bilarnar longur. Lastbilar og oljubilar taka so nógv pláss, staðfestir heimasíðan bkv.fo.

Teistin gjørdi annars fleiri túrar í gjár, har hann var fullur av bilum og ferðafólkum.

- So loysnin er sjálvsagt Sandoyartunnilin, og hann má koma skjótt, verður staðfest.

**sb.**



*Long bíðirøð við bilum í Skopun seinnapartin í gjár*

*Mynd: bkv.fo*

**Hevur tú hug at koyra post og frakt meðan tú ert heima millum túrar ?**

Sjófólk, fólk í oljuvinnuni og aðrari vinnu, sum eru burturi og heima 3-6 mánaðir skiftandi, men ikki hava hug at liggja bakk tíðina heima, hava møguleika at fáa avloysarastarv sum bilførarar á flutningsdeildini hjá postverkinum.

Starvið er avbjóðandi og í tøttum samstarvi við kundar og deildir okkara.

Dentur verður lagdur á góðan røkiskap og nærlagni. Vit ynskja okkum jaligar starvsfelagar, ið duga væl at samskifta við kundan og starvsfólkini á øllum deildum okkara. Tú dugir væl at virka sjálvstøðugt men eisini í toymi. Tú hevur góð evni at umstilla teg í broytiligum umhvørvi og kann ganga undan. Tað er eitt krav, at tú hevur stóra koyrikortið og reina straffiattest.

Størvini verða sett skjótast til ber.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Postfelag og Føroya Landsstýri.
Talan er um fulltíðarstørv 39 tímar um vikuna.

Áhugað kunnu seta seg í samband við:
Leivur Rubeksen, leiðara
Telefon 236020
Teldupost: leru@postverk.fo

Umsókn skal verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi **28. mars 2008** á middegi.

**Send umsóknina til:**

Pf. Postverk Føroya
Stílað: Marry Poulsen, starvsfólkaleiðara
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Stutt um Postverk Føroya
280 fólk starvast hjá P/F Postverki Føroya. Hin 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alt virksemi felagsins, er á Óðinshædd í Tórshavn. Saman við samstarvsfelagum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

postverk.fo

www.sosialurin.fo

Haldaragjald!!!

Hava tit minst til at gjalda haldaragjaldið fyri apríl ársfjórðingin?

Steðgidagur er 31. mars.

Sosialurin